# Skálafjørðurin er hart raktur



**ARBEIÐSLOYSI** Nú Faroe Seafood í Runavík og Faroe Seafood á Toftum eru afturlatin, samstundis sum seks ísfiskatrolarar eru lagdir, er eysturarmurin á Skálafjørðinum hart raktur

Vilmund Jacobsen

Í gjár fingu fólk, sum eru vorðin arbeiðsleys á Faroe Seafood í Runavík, uppsøgn í hølunum hjá Arbeiðarafelagnum Hæddini, samstundis sum tey fingu fylt út umsóknarblað til ALS og Almannastovu.

Karla Einarsson, forkvinna í Hæddini, sigur, at høvi var hjá fólki at koma eftir uppsøgnini millum klokkan 13 og 16 í gjár.

– Øll møttu ikki í dag, men tey vóru nógv, sum vóru inni á gólvinum. Tað var umboð fyri búgvið eftir Faroe Seafood, sum handaði teimum uppsøgnina, og síðan vóru umboð fyri Hæddina, Arbeiðsloysiskipanina og Almannastovuna, sum hjálptu fólki við umsóknarbløðum.

Karla sigur, at øll tey, sum fingu uppsøgnina og fingu fylt út umsóknarbløð, nú ikki nýtast at gera meiri við hetta.

– Millum tey, sum møttu, vóru eisini útlendingar, sum ikki hava permanent arbeiðsloyvi í Føroyum, og hesi vórðu hjálpt av Almannastovuni, so tey eisini fáa síni rættindi.

Karla sigur, at nógvir limir í Arbeiðarafelagnum Hæddini hava mist arbeiði, nú Faroe Seafood í Runavík er latið aftur, og óvissa enn er um landingarmiðstøðina Kongshavn.

– Tey, sum starvast hjá Kongshavn, fingu tó ikki uppsagnarbræv í dag, leggur hon aftrat.

Karla sigur, at tey eisini fingu kunnað tey arbeiðsleysu um treytirnar við tryggingini, sum tey hava hjá Føroya Arbeiðarafelag.

– Her er tað soleiðis, at eru fólk arbeiðsleys í meiri



enn tríggjar mánaðir, noyðast tey at syrgja fyri inngjaldinum sjálvi, um tey ikki skulu detta úr tryggingini, sigur forkvinnan í Arbeiðarafelagnum Hæddini.

Hon leggur aftrat, at eini 140 fólk arbeiddu hjá Faroe Seafood í Runavík, tá mest var at gera, og ein fittur partur av hesum eru

# Samstarvið aftur á rættari kós

**SAMSTARV** Árni Dam er helst tann føroyingurin, sum hevur verið heitastur talsmaður fyri enn størri samstarvi við russar. Nú nýggj fiskiveiðiavtala er undirskrivað við russar, samstundis sum samráðingarnar við Noreg endaðu úrslitsleysar, er hann enn meiri sannførdur um, at Føroyar og Rusland eiga at samstarva enn meiri

## Ég eri sera fegin um, at viðurskiftini millum Føroyar og Rusland nú eru í lagi aftur

ÁRNI DAM

Vilmund Jacobsen

– Føroyingar hava bygt nógv skip í Noreg, og føroyingar hava arbeitt nógv fyri norðmenn, bæði umborð á skipum og í landi. Men kortini vísa norðmenn okkum onga vælvild. Hetta vístu eisini seinastu samráðingarnar um fiskiveiðiavtalu landanna millum.

Tað sigur Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum, nú norðmenn enn einaferð brúka árligu fiskiveiðiavtaluna sum jarnbrot fyri at trýsta føroyingar í býtinum av makrelkvotuni.

Føroysku umboðini fingu einki burtur úr samráðingunum um sínámillum fiskiveiðirættindi við norðmenn á fundi í vikuni.

Ikki so óvæntað brúktu norðmenn fiskiveiðiavtaluna fyri 2011 sum jarnbrot fyri at trýsta føroyingar í spurninginum um býtið av felagskvotuni av makreli.

Hetta hava norðmenn gjørt áður, og tí var tað heldur ikki óvæntað, at teir eisini fóru at gera tað hesaferð.

### Á rættari kós

Árni Dam er sera fegin um fiskiveiðiavtaluna, sum Føroyar og Rusland undirskrivaðu herfyri og sum gevur føroyingum eitt enn betri býti enn áður, hóast vit lítlan og ongan svartkjaft høvdu at lata.

– Jú, eg eri sera fegin um, at viðurskiftini landanna millum nú eru í lagi aftur eftir tað, sum hendi, tá Skálaberg varð tikin og kom at liggja leingi í Murmansk.

Árni Dam er onga løtu í iva um, at føroyingar hava nógv meiri at heinta hjá russum enn hjá norðmonnum, tí hetta er so ofta komið til sjóndar áður.

– Føroyingar hava bygt nógv skip í Noreg, og føroyingar hava arbeitt nógv fyri norðmenn, bæði umborð á skipum og í landi. Men kortini vísa norðmenn føroyingum onga vælvild. Hetta vístu eisini seinastu samráðingar um sínámillum fiskiveiðiavtalu, sigur Árni sum heldur, at Føroyar og Rusland veruliga áttu at ment samstarvið landanna millum enn meiri.

Árni Dam hevur áður nevnt fleiri økir, sum hann heldur kundu verið áhugaverd at samstarva um, og hann hevur eisini spurt, hví føroyingar ikki keypa olju úr Ruslandi.

vilmund@sosialurin.fo

*– Føroyar og Rusland áttu veruliga at ment samstarvið landanna millum enn meiri, heldur Árni Dam, russiskur konsul í Føroyum*